## Rinda ikki lán

Nógvir danskir sethúsaeigarar rinda ikki avdráttir av sínum lánum. Ein nýggj uppgerð hjá Tjóðbankanum vísir, at heili 37,5 prosent av øllum realkredittlánum til sethús og eigaraíbúðir eru av slíkum slagi, at lántakararnir rinda bara rentur, men ikki avdráttir. Uppgerðin vísir eisini, at altsamt fleiri danskir sethúsa- og íbúðareigarar velja hendan møguleikan. Bara í oktober mánað tóku teir 13 mia. krónur í avdráttarfríum lánum.

## Íløgur í list

Ivast tú í, hvørjar íløgur tú skalt gera fyri at tryggja tær, at tær í minsta lagi varðveita sítt virði, so eru hyggjuráðini at seta pengarnar í listarverk. Tað halda í hvussu er listserfrøðingar í Noregi. Tey seinastu árini er prísurin á listarverkum hækkaður nógv, og tey, sum ognaðu sær eitt gott listarverk fyri nøkrum árum síðani, kunnu gera kvetti við at selja í dag. Men tað loysir seg helst uppaftur betri at bíða við at selja, siga teir.

# – Gevur íblástur at luttaka



*Jana Jacobsen og Hanna Wang á sama bási: - Tað er spennandi at vera við*

**Um vikuskiftið var møguleiki hjá fólki at vitja ta stóru jólasøluna sum Føroya Heimavirkisfelag skipaði fyri. Samstundis bar til at ogna sær ein hóp av snotiligum og góðum heimavirkaðum lutum**

HEIMAVIRKI
*Orð & mynd: Snorri Brend*

**Havn:** – Henda jólasølan vísir týðiliga, at føroyingar duga at gera heimavirkaðar lutir, siga tveir av luttakarunum á jólasøluni, Hanna Wang og Jana Jacobsen úr Kaldbak.

Umframt tær báðar eru væl omanfyri 50 luttakarar á ársins jólasølu, sum var opin leygardagin og sunnudagin.

Báðar dagarnar var ein javnur streymur av fólki sum vitjaðu í ítróttarhøllini á Hálsi.

Tær báðar ungu kvinnurnar úr Kaldbak sum eru á sama bási eru væl nøgdar við luttøkuna.

- Her kemur fólk framvið allatíðina. Og vit hava eisini selt eitt sindur, siga tær báðar.

Teir hava fleiri ymiskar lutir til sølu. Nógv av tí er bundið, men har finnast eisini nissur, konfekt og annað.

Fyri Hannu og Janu er tað í fyrsta lagi bæði spennandi og stuttligt at verða við til slíka jólasølu.

Men hetta týðir meir enn bert tað fyri tær:

- Hetta gevur okkum íblástur til at arbeiða víðari – ja, til líkasum at halda okkum í gongd, siga Jana og Hanna.

Jólasølan hjá Heimavirkisfelagnum endaði sunnuøkvøldið kl. 19.

# Ójavnir listamenn samdir í einum

**Seinnapartin leygardagin læt upp grafiska framsýningin "Súgur" í Norðurlandahúsinum við verkum hjá Tóroddi Poulsen og Bjarne W. Sørensen.**

FRAMSÝNING
*Orð og mynd: Snorri Brend*

**Havn:** Tey 66 verkini á framsýningini eru øll gjørd á Grafiska Verkstaði Føroya.

Seinastu 10 árini hevur hesin verkstaðurin samstarvað við teir báðar í eini avbjóðandi og tí, teir nevna eini "inspirerandi prosses", sum haraftrat hevur verið ógvuliga fjølbroytt.

Nú var løtan komin, til at almenningurin skuldi fáa kunnleika til nøkur av teimum verkum, sum hesir báðir rættiliga ójøvnu listamenninir hava latið úr hondum.



*Bjarne W. Sørensen hevur ikki skrivað so nógv. Men listarverkini eigur hann mong*

Sagt verður um teir báðar, at hin 46 ára gamli Bjarne Werner Sørensen hevur gjørt óteljandi framsýningar, men fáar bøkur. Hinvegin hevur hin 49 ára gamli Tóroddur Poulsen gjørt óteljandi bøkur, men fáar framsýningar.

Bjarni eigur 22 verk á framsýningini, har tey flestu teirra eru steinprent. Tóroddur hevur bert gjørt steinprent, og eru tey 43 í tali.

Hinvegin standa teir báðir aftan fyri tað upprunaliga grafiska bókaverkið "Villvísi", sum fólk hava høvi at síggja í forhøllini í Norðurlandahúsinum.

Framsýningin við grafikki er í Norðurlandahúsinum til og við 31. januar 2007.

## Løtt og leskilig jólasøla

**Nú minni enn mánaður er eftir til jóla eru fólk farin at keypa jólagávurnar. Nógvar bøkur fara um handilsdiskarnar í hesum døgum.**

BØKUR
*Snorri Brend*

Eitt yvirlit frá Rit & Rák vísir, at nýggja matbókin "Lætt og Leskiligt 2" hjá teimum báðum Jóhonnu á Tjaldrafløtti og Elisabeth Akursmørk liggur ovast á listanum fyri seldar bøkur í seinastu viku.

- Og tað er heldur eingin ivi um, at henda bókin verður hon, ið mest verður seld nú uppundir jól. Hon skilir seg heilt burturúr frá hinum, sigur Kári Árting, stjóri í Rit & Rák við Portalin.

Næstmest selda bókin er somuleiðis ein matbók, nevniliga Okkara Kokkur sum Guðmundur Guðmundsson hevur givið út.

Á triðja plássi er bókin um Janu og síðani Ziskatrøðbrekkan og Lívsbardagi á Kappanum.

Enn er onkur bók ikki útkomin til jólasøluna. Millum hesar telist bókin um torvið hjá Petur Jacob Sigvardsen.

Hinvegin roknar Kári Árting við, at um ein hyggur eftir bókasøluni fyri alt árið í ár, so verður uttan iva Okkara Sangbók hon, ið flest munnu hava ognað sær tá avtornar.

Annars er barnabókin Dumbo hon, ið mest er seld, og tá talan er um skúlabøkur liggur Les 1 á odda.